## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**
1. deild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 30.03 | 14.30 | Neistin-VÍF |
| 30.03 | 15.00 | Stjørnan-Kyndil |
| 30.03 | 15.00 | VB-StÍF |

1. deild menn

| | | |
|---|---|---|
| 30.03 | 16.00 | Neistin-VÍF |

**Fótbóltur**

**Kappingin um Løgmanssteypið**

Bólkur 1

| | | |
|---|---|---|
| 29.03 | B68-FSV | Jens Petur Brattalíð |
| 29.03 | TB-NSÍ | Eiler Rasmussen |

Bólkur 2

| | | |
|---|---|---|
| 29.03 | VB-KÍ | Niklas á Líðarenda |
| 29.03 | AB-EB/S | Lassin Isaksen |

Bólkur 3

| | | |
|---|---|---|
| 29.03 | Skála-GÍ | Birgir Sondum |
| 30.03 | HB-B36 | Suni Johansen |

**Steypakappingin kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 29.03 | GÍ-EB/S | Jonhard Hansen |
| 29.03 | B71-AB | Hans F. Hansen |
| 29.03 | Sumba-HB | Eyðun Svalbard |
| 29.03 | FSV-B68 | Johann Krog |

## Hondbóltsstøður

**1. Deild kvinnur**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 9 | 8 - 1 - 0 | 547 | 446 | 101 | 26 |
| 2 | VÍF | 9 | 6 - 2 - 1 | 492 | 404 | 88 | 22 |
| 3 | StÍF | 8 | 4 - 1 - 3 | 476 | 489 | -13 | 15 |
| 4 | Stjørnan | 9 | 2 - 1 - 6 | 453 | 457 | -4 | 13 |
| 5 | Kyndil | 9 | 3 - 1 - 5 | 508 | 520 | -12 | 13 |
| 6 | Neistin | 9 | 4 - 0 - 5 | 435 | 464 | -29 | 13 |
| 7 | Tjaldur | 9 | 1 - 0 - 8 | 400 | 531 | -131 | 3 |

**1. Deild menn**

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 10 | 7 - 0 - 3 | 694 | 587 | 107 | 23 |
| 2 | StÍF | 9 | 6 - 2 - 1 | 604 | 528 | 76 | 23 |
| 3 | Kyndil | 9 | 6 - 2 - 1 | 583 | 553 | 30 | 20 |
| 4 | Neistin | 9 | 4 - 1 - 4 | 598 | 565 | 33 | 18 |
| 5 | KÍF | 10 | 2 - 2 - 6 | 599 | 626 | -27 | 11 |
| 6 | H71 | 10 | 4 - 0 - 6 | 563 | 652 | -89 | 11 |
| 7 | Tjaldur | 9 | 0 - 1 - 8 | 523 | 653 | -130 | 4 |

## Máltindarnir

**kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Daiva Tuomaite | VB | 170 | (46) |
| Asta Petrauskiene | StÍF | 159 | (41) |
| Danijela Ercevic | Stjørnan | 154 | (42) |
| Simona Dziugyte | Neistin | 148 | (50) |
| Reda Kurkauskiene | VB | 138 | (19) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 138 | (42) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 130 | (64) |
| Milica Ergic | Tjaldur | 122 | (24) |
| Natasja Stamenkovic | Stjørnan | 114 | (9) |
| Lenka Ribaric | Tjaldur | 112 | (32) |
| Alina Olaru | StÍF | 101 | (8) |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 91 | (8) |
| Nicoleta Radu | VÍF | 87 | (1) |
| Ileana Manolescu | Kyndil | 82 | (13) |
| Nikolina Eyðbjørnsdóttir | VÍF | 67 | |

**Menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 196 | (20) |
| Damir Oros | KÍF | 186 | (41) |
| Sveinur Justinussen | StÍF | 147 | (23) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 143 | (5) |
| Áki Olsen | VÍF | 140 | (11) |
| Morgan Knezevic | Neistin | 127 | (26) |
| Ingi Olsen | VÍF | 126 | (27) |
| Jacob Jónsson | Kyndil | 119 | (7) |
| Áki Mørk | Neistin | 112 | (26) |
| Finnur Hansson | Kyndil | 103 | (13) |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 103 | (22) |
| John Zachariasen | VÍF | 95 | |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil | 95 | (27) |
| Niels Viggo Niclassen | H71 | 93 | (1) |
| Petur Martin Poulsen | KÍF | 91 | |

# Nú bíða vágbingar

**Missir VÍF í Havn móti Neistanum, kann VB longu sunnudagin ogna sær meistaraheitið, um tær vinna heimadystin á StÍF**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Spurningurin er ikki longur um. Heldur er tað nær verður VB meistari.

Eftir eitt gott grundspæl og eitt sannførandi endaspæl, har einasti stigamissurin hevur verið javnleikurin í Vestmanna, tykjast tey í VB nú bert at bíða eftir, at meistaraheitið skal koma til felagið. Og hetta kann gerast veruleiki sunnudagin, tá StÍF kemur á vitjan.

### Skulu vinna sítt

Fortreytirnar fyri hesum skapa tær í VB tó ikki sjálvar. Hesar verða skaptar í Havn, har VÍF er á vitjan hjá Neistanum. Ein dystur, har VÍF vanliga hevur havt góð úrslit, og har tær avgjørt eru favorittar aftur í ár, men hinvegin skal ikki síggjast burtur frá, at Neistin seinastu vikurnar hevur verið væl fyri. Somikið væl, at tær nú eru um at blanda seg í heiðursmerkjastríðið, men til tess krevst í øllum førum ein sigur á V´FI, sum enn hevur teoretiska møguleikan fyri gullinum, men sum hinvegin helst má ásanna, at í ár verður talan bert um silvur.

Alt hetta er tó bert tos fyri VB. Tað, sum tær skulu gera, er fyrst og fremst at vinna sínar dystir, og tað er einki at ivast í, at hetta verður aðalmálið sunnudagin, so má hitt koma, sum tað kemur.

Og av royndunm frá seinasta vikuskifti munnu tær í VB vera greiðar um, at hetta kemur ikki av sær sjálvum. Ótilvitað er oddastøðan helst viðvirkandi til at leggja eyka trýst á liðið, soleiðis at spælið kanska gerst dekan ov stirvið, soleiðis sum tað var móti Kyndli seinast, og tó at tann dysturin gav tvey stig av sær, so var tað ikki meira enn akkurát. Tí er einki at ivast í, at týdningarmesta uppgávan hjá venjaranum verður at sannføra leikararnar um, at tað er hesin dysturin – og bara hesin – sum hevur alt at siga.



*Fagnaðurin á vágbingum var øgiligur, tá liðið fyrr í ár vann steypakappingina, og nú standa áskoðararnir klárir at taka greipuna, tá hendan kemur*

### Bronsan enn opin

StÍF er í løtuni liðið, sum liggur best fyri í bronsustríðnum, men tapa tær dystin í Vági, letur hetta væl og virðiliga dyrnar á glopp hjá øðrum liðum. Her eru Kyndil og Stjørnan helst tey, sum hava bestar møguleikar at seta kílar í, og júst hesi bæði liðini hittast í Klaksvík.

Einki er at ivast í, at tað her verður talan um dyst, har báðir partar fara at stríðast av øllum alvi, til tess at røkka málinum. Og vanliga plagar talan eisini at vera um undirhaldandi dystir, tá hesi liðini hittast í Klaksvík.

# Neistin kann tveitast burtur

**Vinnur VÍF á Neistanum – og tað eru teir noyddir til – eru teir bláu helst tveittir úr heiðursmerkjastríðnum**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Bert ein dystur verður í bestu mansdeildini í hondbólti ehtta vikuskiftið. Hetta er tá VÍF vitjar Neistan í Havnini, og er hetta samstundis seinasta forðingin hjá VÍF fyri at kunna verða partur av eini sannari FM-finalu í seinasta umfarinum. Hetta er nevnliga næst seinasti dysturin hjá VÍF, og fáast tvey stig burtur úr hesum, kann munurin upp til strandingar í mesta lagi vera tvey stig undan seinasta dystinum.

Tí er einki at ivast í, at VÍF fer at seta øll segl til í royndunum at vinna, og á pappírinum mugu teir eisini roknast sum favorittar. Í øllum førum hava teir vunnið hampuliga sannførandi hinar tríggjar dystirnar móti Neistanum í ár, og í veruleikanum er størsta forðingin kanska av mentalum slag. Mikukvøldið var um reppið, at teir taptu fyri Tjaldri, tá tankarnir kanska longu vóru frammi hjá 12. apríl, og verður sama mistakið framt aftur hesaferð, er als ikki víst, at teir sleppa eins væl.

Hjá Neistanum er tað nevnliga soleiðis, at fáa teir ikki stig, so verður talan helst heldur ikki um heiðursmerki í ár. Undan kappingarárinum vóru kanska heldur ikki so mong, sum høvdu roknað við hesum, men eftir at hava verið partur av oddastríðnum alt grundspælið, man tað í øllum førum kennast hugstoytt, at so skal vera.

Enn hava teir bláu úr høvuðsstaðnum tó møguleikan, men hart verður tað í øllum førum. Umframt komandi dystin móti VÍF, eru mótstøðulini StÍF og Kyndil, so skal Neistin hava heiðursmerki, mugu teir í øllum førum stríðast fyri hesum.

# Sandavágsrenning

**Leygardagin 5. apríl skipa Sandavágs Ítróttarfelag og Frælsur Ítróttur Føroya fyri rennikapping í Sandavági.**

RENNING
*tíðindaskriv*

Hendan kappingin er eitt sindur ørðvísi á tann hátt, at bert tey, ið luttóku í stóra tiltakinum í Vágatunlinum, Runnið undir sundi, 8. desember í fjør, kunnu luttaka.

### Grót úr tunlinum

Í samband við tunnilstiltakið vórðu serlig heiðursmerki framleidd úr gróti úr tunlinum. Tá fyriskipararnir vegna óvæntaða stóra luttøku gjørdu av at broyta kappingina til eitt motiónstiltak, var lovað, at tey, ið høvdu hug, skuldu sleppa at kappast um hesi heiðursmerkini 5. apríl í Sandavági.

### Ymsir bólkar

Kappingin 5. apríl er býtt í ymsar bólkar. Hesir bólkar eru gjørdir sambært tí aldri, luttakararnir høvdu, tá tunnilsrenningin var. Kappast verður á hesum teinum:

Dreingir -7/Gentur -7 (f.1995 ella seinni) renna 500 m.
Dreingir -10/Gentur -10 (f.1992-1994) renna 500 m.
Dreingir -13/Gentur -13 (f.1989-1991) renna 1000 m.
Dreingir -17/Gentur -17 (f.1985-1988) renna 1000 m.
Kvinnur (f. 1957-1987) renna 5 km
Menn (f. 1957-1987) renna 5 km
Veteranar kvinnur (f. —1956)renna 5 km
Veteranar menn (f. —1956) renna 5 km

Øll kappingin fer fram nærhendis kirkjuni í Sandavági. Tveir teir smærru aldursbólkarnir hjá børnum renna eina rundu á eystara áarbakka, meðan tveir teir størru renna tvær. Tey vaksnu renna góðar 5 rundir í bygdini.

Tað er ókeypis at luttaka í kappingini 5. apríl. Tó er neyðugt at boða frá luttøku í seinasta lagi mikudagin 3. apríl.

# FM í talvi 2003
ATLANTIC AIRWAYS Cup

Allir telvarar vera við hesum bodnir at kappast um FM-heitið í talvi fyri einstaklingar á Læraraskúlanum í Havn í døgunum 12. - 19. apríl 2003

Bólkabýtið verður soleiðis:

**Landsliðsbólkurin** verður skipaður við 16 telvarum, 6 útlendingum og 10 føroyingum. 11 umfør eftir FIDE Schweizer skipanini verða í landsliðsbólkinum.
**1. bólkur** verður skipaður við 10 telvarum, allir ímóti øllum. Hugsunartíðin í Landsliðsbólkinum og 1. bólki verður 90 minuttir + 30 sekund fyri hvønn leik til alt talvið.
**2. bólkur** verður skipaður eftir FIDE Schweizer við 8 umførum. 2. bólkur hevur óavmarkað tal av telvarum.
**Unglingabólkurin** verður skipaður eftir FIDE Schweizer við 8 umførum. Aldursmarkið í unglingabólkinum er 20 ár. Hugsunartíðin í 2. og unglingabólkinum verður 120 minuttir til 40 leikir og 30 minuttir til restina.
**Eldrabólkurin** verður skipaður við 6 umførum í FIDE Schweizer ella allir ímóti øllum. Telvað verður 17., 18. og 19. apríl. Hugsunartíðin í Eldrabólkinum verður 60 minuttir til alt talvið. Telvarar í Eldarbólkinum skulu vera fyltir 50 ár, tá kappingin byrjar.

Byrjað verður at telva hvønn dag kl.14. Teir dagar dupult umfør eru, telva bólkarnir 2 umfør, kl.10 og kl. 16.

Luttøkugjaldið er: 1. og 2. bólkur 350 kr., Unglingar og Eldrabólkurin 200 kr.

Tilmeldingin fer fram við at gjalda luttøkugjaldið á kontonr. 9181-123.734.0 í Føroya Sparikassa, ella 6460-150.552.3 í Føroya Banka.

Seinasta freist at boða frá luttøku er fríggjadagin tann 4. apríl 2003.

Fleiri upplýsingar eru at finna á www.faroechess.com



Havnar Telvingarfelag

Mentamálaráðið
*Fólkaskúladeildin*

# Skúlastjórastarv í Hoyvíkar skúla

**Starvið sum skúlastjóri í Hoyvíkar Skúla verður lýst leyst til setanar frá 1. august 2003.**
**Skúlaárið 2003/2004 verða 434 næmingar í 7 árgangum í skúlanum. 29 lærarar starvast í skúlanum.**

**Søkt verður eftir skúlastjóra, sum**
- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna av virksemi skúlans
- skal sýna leiðslumyndugleika og -hegni
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er kveikjandi í sínum skúlahugsanum og hevur hugsjónir um skúlamenning
- á fólkaræðisligum støði skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum næmingar, lærarar og onnur samstarvsfólk
- er førur fyri at skilja støðuna hjá øðrum.

**Harumframt skal skúlastjórin**
- hava hug og hegni til at átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- leggja dent á at fremja andsfrælsi, tolsemi og gott samarbeiði millum skúla og heim
- vera førur fyri at loysa trupulleikar
- vera førur fyri at røkja og menna starvsfólkasamstarvið
- vera førur fyri at útinna starvsfólkaleiðslu
- skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd
- leggja dent á menning av skúlaskapinum í kommununi
- eggja næmingum, foreldrum og lærarum til at leggja doyin á at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er, undir Mentamálaráðnum í Streymoyar skúladømi III við fyribils tænastu í Hoyvíkar Skúla og tann, ið sett/-ur verður, eigur at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Starvið verður lønt í lønarflokkinum 35.1 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. Starvið verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann sum sett/-ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

**Umsóknir**
Umsókn, sum liggur á heimasíðuni *www.mmr.fo*, skal vera Mentamálaráðnum í hendi ***í seinasta lagi týsdagin 1. apríl 2003.***

Um tú ynskir fleiri upplýsingar um starvið, kanst tú ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, ella Olaus Jespersen, deildarstjóra.

17. mars 2003
**Mentamálaráðið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279 - 110 Tórshavn
Telefon 355050 - Fax 355055
e-postur: MMR@MMR.fo

***Mentamálaráðið*** *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*

**Nýggjar TANNPROTESUR**
Broytingar og umvælingar av gomlum protesum
Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð
Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12
Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480

**Arbeiðshandskar**
til øll endamál - bæði á sjógvi og landi
Beinleiðis frá framleiðara
Landsins størsta úrval
frá eingangshandskum til
fóðraðar Japan-handskar
ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc fo
Sosialurin 311820

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo
**Trygdarútgerð til øll endamál**


- Verndarhjálmar
- Hoyrivernd v/FM-Radio
Tilboð kr. 798,-
- Luxus termodraktir
Tilboð kr. 598,-
- Trygdarskógvar, nógv model - høgur kvalitetur
- Fallsikringar
- Handskar til øll endamál
- Skeltir til øll endamál
Sosialurin 311820

# Aðalfundur

Borðtennissamband Føroya hevur aðalfund í ÍSF-húsinum fríggjakvøldið 11. apríl kl. 19.00.

Skrá sambært lógum sambandsins.

**Borðtennissamband Føroya**

# Lærari søkist

Søkt verður eftir lærara í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2003/2004 til Húsar/Syðradals skúla.

Starvið er fulltíðarstarv og umfatar 1. til 9.flokk.

Skrivlig umsókn verður at senda til

**Skúlastýrið**
v/ Elin Syderbø, 796 Húsar

Sosialurin -tað loysir seg